



*Í bussinum á veg til aktivitets-vikuskifti fyrireikaðu Heiða og Ragnhild, sum eru heilt nýggjar í OD-bólkinum, seg upp á fyrilestrarnar. Her sita tær og lesa um verkætlanina í ár í Bolivia*



*Nógv nýggj vinaløg vórðu knýtt hetta vikuskiftið. Her siti eg í temaballinum saman við einum OD-ara úr Keypmannahavn*

workshoppum. Í løtuni arbeiða vit m.a. við at halda eitt super feitt listarligt OD-tiltak í Posthúskjallaranum fríggjadagin 5. oktobur, har tað bæði verður feitur tónleikur, myndlist, dansur o.a.

Tað síðsta tiltakið í kvøld hevur verið eitt spæl, sum kallast "Advokaturin hjá djevlinum". Hetta gongur út uppá, at vit skulu sita saman í nøkrum bólkum og gera kritiskar spurningar um OD-arbeiðið, sum hinir bólkarnir skulu svara aftaná. Hesir kritiskir spurningarnir skulu fyrireika okkum uppá kritikkin, vit kunnu møta frá næmingunum úti á skúlunum.

Í løtuni eru øll rundan um meg í flokksstovuni við at gera seg til klár til kvøldsins temaball, har øll skulu vera í antin træla- ella góðseigaraklæðum. Christa og Heiða sita engageraðar við síðuna av mær og diskutera trælamóta, tí ballið byrjar um eina lítla løtu – so eg má eisini heldur fara at finna mær nøkur klæðir fram at fara í.

**Sunnud. 9. sept. '07 kl. 12.06.**
So er aktivitets-vikuskiftið við at líða ímóti endanum.

Eg siti saman við hinum OD'arunum á græsplenuni framman fyri skúlanum og njóti sólina, sum skínur frá einum skýfríum, bláum himmali.

Temaballið í gjár var sera væleydnað og vit komu at kenna fleiri av donsku OD-bólkunum heilt væl. Ballið byrjaði við gallamati (nógvir av OD'arunum eru vegetarar og tí varð hetta altso vegetar-galla-matur), har man hevði møguleika at koma at tosa við hinar OD-bólkarnar. Vit komu hervið at kenna nakrar dreingir úr einum OD-bólki úr Keypmannahavn heilt væl. Seinni var hippie-dansur í fimleikahøllini, har bæði trælir og góðseigarir dansaðu saman.

Í morgun vórðu vit, eins og í gjár, vakt av nøkrum av OD'arunum frá sekreteriatinum, sum róptu "Góðanmorgun, góðanmorgun, so er upp at eta morgunmat, tí morgunmatur er guð!", meðan tey hamraðu hart á grýtir og pannir.

Fyrsti fyrilestrarhaldarin í dag var ein donsk kona, sum helt ein fyrilestur í ein tíma við ljósmyndum um hennara uppihald í Bolivia og hvussu hon varð móttikin av fólkinum har.

Aftan á hetta vóru ymisk stuttlig barnaspøl í góða veðrinum og síðan fingu vit ymiska kunning um, hvussu OD í ár verður meiri tekniskt við m.a. einum nýggjum intraneti. Vit fara í ár at royna at skipa alt OD-arbeiðið á telduna og fáa betur samskifti við hinar OD-bólkarnar, vit nú eisini hava lært at kenna.

Restina av degnum skulu vit brúka uppá at uppsummera alt, vit hava fingið burturúr hetta vikuskifti og hoyra um, hvussu tað gongst við Suðurafrika-verkætlanini frá síðsta ár. Men áðrenn vit sleppa aftur til Keypmannahavnar við bussinum, skulu vit øll 200, sum taka lut í aktivitets-vikuskiftinum, vera við í ruddingini og vaskingini av skúlanum, so tað kann verða klárt til mánadagin, tá ið vanligu skúlanæmingarnir koma í skúla aftur her.

At vit hava fingið ordiliga nógv burturúr hesum vikuskiftinum, haldi eg ikki, at nakar ivi kann vera um. Vit gleða okkum nú bara ordiliga nógv til at koma aftur til føroysku klettarnar og deila okkara nýggju vitan við øllum tykkum har heima og siga næmingunum á føroysku skúlunum frá, hví tað er so týdningarmikið, at so nógvir næmingar sum møguligt fara út at arbeiða á OD-degnum fyri at geva ein dag av sínari útbúgvingartíð, fyri at guaraní-indiánarirnir eisini kunnu fáa ein møguleika fyri at nema sær eina útbúgving – og harvið frælsi til at velja sína egnu framtíð!



*Innsavnaðu OD-pengarnir fara í ár til at hjálpa guaraní-indiánarunum úr teirra skuldartrælahaldia*

FAKTA

### Operatión Dagsverk

Operatión Dagsverk (vanliga stytt "OD") er ein hjálparfelagsskapur, ið varð settur á stovn í 1985 av nøkrum donskum studentum – og síðani 1997 hevur Føroyar eisini verið ein partur av OD

Hugskotið aftan fyri OD er, at felagsskapurin hvørt ár velur eitt land at stuðla. Næmingar úr ymiskum miðnámsskúlum fara so út á ymisk arbeiðspláss ein dag í novembur mánaða fyri at vinna pengar til tað landið, stuðlað verður

OD stendur næstan bert av frívilligari arbeiðsmegi: Á skúlunum, ið eru partur av OD, eru nakrir sokallaðir "OD-bólkar", sum skipa fyri OD-arbeiðinum á skúlunum. Nakrir OD'arir, ið eru lidnir við sína miðnámsskúlaútbúgving, sita dagliga fulla tíð á OD-sekreteriatinum nær við Ráðhúsplássið í Keypmannahavn. Her frá stýra teir OD-kampagnuna úti á skúlunum og eru til rádigheit fyri OD-bólkarnar runt um á skúlunum, um nøkur ivamál eru. Eisini eru nakrir aktivistar, sum eru gamlir OD'arir, ið ikki rættiliga megna at sleppa OD aftur. Hesir taka m.a. lut í arbeiðinum hjá fólkunum á Sekreteriatinum við at skipa fyri tiltøkum og tílíkum

OD hevur ein flatan leiðsluform – t.v.s. at eingin hevur meira at siga enn onkur annar í OD. Allar avgerðir, ið verða tiknar, verða debatteraðar og hareftir atkvøddar fyri ella ímóti á OD-stórmøtinum fyrsta vikuskifti av desembur mánaða, har allir OD-bólkar eru bjóðaðir

Í ár hava vit á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði ein super góðan og arbeiðssaman OD-bólk, sum stendur av 9 næmingum. Hesir næmingarnir arbeiða hart fyri at gera eina ordiliga góða OD-kampagnu og breiða OD út til aðrar føroyskar miðnámsskúlar

Og 1. novembur verður tann føroyski OD-dagurin so hildin og vit vóna, at stór undurtøka verður her aftur í ár